

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein

# MATUR TIL JÓLABORÐIÐ



MYNDIR: ANTON HØJGAARD

NÆMINGAR Á **HÚSARHALDSSKÚLA** HAVA GJØRT MAT, KONFEKT OG PYNT TIL SÍTT EGNA **JÓLABORÐHALD**. VIT LØGDU LEIÐINA FRAM VIÐ, TÓKU MYNDIR OG FINGU UPPSKRIFTIR

**21 næmingar ganga í løtuni á Húsarhaldsskúla í Klaksvík, og tey hava rættiliga roynt seg í jólamánaðinum.**

- Desember er ein serligur mánaði, og vit gera nógv burtur úr mati og pynti í sambandi við jólini. Næmingarnir gera allan matin og pyntið til okkara jólaborðhald, sigur Jóhanna á Tjaldrafløtti, sum er leiðari fyri Húsarhaldsskúla Føroya.

Farna vikuskiftið var jólaborðhaldið hjá næmingunum, og vit løgdu leiðina fram við og fingu myndir av mati og konfekt, og vit fingu eisini nakrar av uppskriftunum, sum næmingarnir hava brúka.